# EG STÚRI FYRI ØLLUM

HEILI 40 **FILMAR** UM FØROYAR HEVUR HANN SPRÆNT ÚT Í HEIM SEINASTU MÁNAÐIRNAR. VIT HAVA HITT FØROYA VIRKNASTA FILMSMANN, **THOMAS KOBA**, SUM IKKI TÍMIR SERLIGA VÆL AT ARBEIÐA OG FYRI TAÐ MESTA HELDUR TIL Í EINI SVARTARI HOLU Í GØTU, HAR HANN SITUR OG STÚRIR



**PORTRETT**

Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Hann er lítil og sjarmerandi og livir sítt egna lív á netinum. Filmurin *Marglittu húsini í Havn* er bara ein av 40 enskum stuttfilmum, sum í løtuni eru á veg ella longu ferðast kring heimin umvegis netmiðilin Youtube og fortelja smáar, øðrvísi søgur um Føroyar. Ein annar av filmunum fortelur, hvussu væl tað liggur fyri at renna í Føroyum, ein triði fer ein biltúr við ellisakførum gjøgnum føroyska landslagið, ein fjórði rekst á havsins botni og fortelur um tara í Føroyum ...

Maðurin handan eyðkendu filmarnar er 30 ára gamli filmsframleiðarin Thomas Koba og hansara filmsfyritøka Kovboyfim, sum kanska er mest kend fyri V4 og Gekka lýsingarnar ella sermerktu spenningsfilmarnar, ið hvørt ár avdúka Ársins Virki.



Thomas Koba saman við kameramanninum Hans Petur Hansen, sum í síni tíð tendraði hansara áhuga fyri at klippa myndir saman til filmar

MYND: ÁLVUR HARALDSEN

## Eitt net av filmum

Hesuferð hevur ungi filmsmaðurin sett sær fyri at fortelja umheiminum eitt sindur um, hvat annað vit eisini gera í Føroyum enn tað, sum vanligu turistfilmarnir vísa. Um filmarnir geva onkrum ferðafólki hug at koma til Føroyar, er tað fínt, heldur Thomas Koba, men málbólkurin er øll sløg av fólki allastaðni – eisini og ikki minst tey, sum bara av tilvild koma fram á teir.

– Um ein maður í Australia situr og dyrkar sín áhuga fyri tara á netinum, poppar okkara tarafilmur skjótt upp og leiðir hann samstundis víðari til hinar filmarnar. Og áðrenn taranørdurin veit av, er hann vovin inn í eitt net av smáum filmum um Føroyar, sum hann kanska eisini fær hug at kanna nærri, sigur Thomas Koba, sum er rættiliga ovfarin av, hvussu væl Youtube egnar seg til at kasta krókar í alskyns fólk kring allan heimin

At byrja við helt hann tað nevniliga virka í so amatørkent at marknaðarføra hesar filmarnar á Youtube, har hvør Hanus og Janus eftirhondini leggur síni filmsbrot. Men nú føroyafilmarnir hava verið tøkir í nakrar mánaðir, hevur Thomas Koba av álvara fingið eyguni upp fyri óendaligu møguleikunum, sum hesin miðilin hevur.

– Tað er rættiliga fantastiskt at fáa ókeypis atgongd til eitt sendinet, sum røkkur øllum heiminum og sum annars hevði kostað milliónir. Hartil fáa vit yvirlit yvir, hvussu nógv og hvørji fólk hyggja eftir filmunum – upplýsingar, tú eisini vanliga skalt gjalda nógv fyri at fáa.

Higartil vísa tølini, at eini 50.000 fólk kring allan heim hava klikt seg inn á filmarnar hjá Kovboyfilm.

## Orðini skulu syngja

Hvørki taramaðurin í Australia ella øll hini, sum hava fingi eygað á onkran av filmunum nýtast at brúka nógva tíð at hyggja. Flestu av filmunum vara nevniliga bert tveir til tríggjar minuttir og virka hvør sær sum sjálvstøðugur filmir. Eitt slag av dokumentarfilmum kallar Thomas Koba teir, uttan at filmarnir tó fylgja reglunum fyri 'journalistiskari korrektheit'.

– Tað ber sjálvandi ikki til at koma allan vegin runt um eitt evni uppá tveir minuttir, og tað er heldur ikki ætlanin við filmunum. Fyri meg snýr tað seg fyrst og fremst um at fylgja eini góðari søgu, finna ein tóna, og syrgja fyri, at orðini koyra ella syngja væl, sigur Thomas Koba, sum sjálvur skrivar handritini til filmarnar saman vit eitt nú Finni Jensen og Una L. Hansen.

Í flestu førum er handritið skrivað, áðrenn upptøkurnar byrja, men onkuntíð eru tað myndirnar, sum gera av, hvat frásøgumaðurin sigur. Sum dømi nevnir Thomas Koba filmin *Síging í Sandoy*, har hann sjálvur fór við einar 300 metrar niður í bergið við upptøkutólinum.

– Eina sovorðna søgu mást tú bara filma, meðan hon hendir og so laga tekstin eftir tí. Um ein mynd vísir, at ein sígari er bangin, so verður tað eisini tað, frásøgurøddin má leggja dent á og ikki okkurt annað, sum vit møguliga vónaðu ella ímyndaðu okkum fór at henda, greiðir Thomas Koba frá og leggur afturat, at hetta veldst sjálvandi um, hvat slag av filmi tað er.

Fleiri av filmunum snúgva seg til dømis um føroyskt vinnulív. Hesir eru lutvíst lagdir til rættis í samstarvi við ávísar fyritøkur, men eftir hugskoti frá Thomas Koba og Kovboyfilm.

– Fyri meg er tað heilt avgerandi, at tað eri eg sjálvur, sum seti treytirnar fyri, nær ein filmur er góður. Um eg ikki føli, at filmurin í síðsta enda er mín filmur, kundi eg líka so væl gjørt okkurt heilt annað, sigur filmsmaðurin avgjørdur.

## Stúrir fyri øllum

Á onkran hátt var tað nokk eisini trongdin til sjálvur at stýra tingunum, sum gjørdi, at hann í 2003 stovnaði sína egnu filmsfyritøku, Kovboyfim, grunar Thomas Koba.

– Faktiskt er tað nokkso løgið, at eg leyp frá einum tryggum starvi, tí í veruleikanum eri rættiliga bangin av mær. Eg stúri fyri næstan øllum, fyri um eg fái uppgávur, um eg klári at loysa tær

> Sum barn dugdi eg hvørki at tekna ella mála. Eg vildi bara verða ljóðmaður, men tað dugdi eg heldur ikki

nóg væl og tað blívir eisini bara verri við aldrinum, tí nú stúri eg fyri, um eg eri blivin ov gamal ella eri nóg nýskapandi, sigur Thomas Koba, sum undrar seg yvir, at hann yvirhøvur fær nakað frá hondini fyri berari stúran.

At Thomas Koba gjørdist filmsskapari var heldur ikki úrslit av, at hann var serliga listarligur sum barn.

– Slett ikki. Eg dugdi hvørki at tekna ella mála og vildi bara verða ljóðmaður. Men tá eg kom í læru sum tøkningur í Sjónvarpi Føroya fann eg út av, hatta við ljóði dugdi eg heldur ikki,

▶